# Gulllaksaskipini sam halda seg til tilráðin

**SEMJA** - Vit, sum eiga skipini, ið fiska gulllaks, eru samd um at gevast at fiska, tá samlaða veiðan er komin upp á ta tilráðing, sum er galdandi, sigur Tummas Christophersen, skipari og reiðari

Vilmund Jacobsen

Nú fiskidagarnir fyri komandi fiskiár eru viðgjørdir og endaliga samtyktir á løgtingi, og nógv hevur kjakast um, hvat burðardygg veiða er, kann Sosialurin í dag bera eina øðrvísi søgu, har reiðaríir sjálv eru samd um at taka málið um burðardyggleika í egnar hendur og fylgja fiskifrøðiligu ráðgevingini.

Tilráðingin fyri gulllaks sigur, at fiskast kunnu umleið 20.000 tons úr stovninum á hvørjum ári, tá mett verður, at hetta er umleið tað, sum stovnurin veksur við í vekt árliga.

Í fjør var gulllaksaveiðan rættiliga góð, og skip vóru leingi á hesi veiði, sum tá helst fór nakað út yvir hesi umleið 20.000 tonsini.

Veiðan hevur eisini verið góð í ár, tó at hon hevur verið eitt sindur misjøvn okkurt skifti í vertíðini.

Fiskiskapurin byrjaði rættiliga væl, og tað tók bert einar 3-4 dagar at fylla skipini undir lúkurnar við gulllaksi.

## Gevast skjótt

Tað eru seks skip sum í fleiri ár hava havt loyvi at fiskað gulllaks í vertíðini, sum plagar at byrja um hálvan apríl og endar út á heystið.

Í ár hava feløgini, sum eiga hesi loyvi, tosað saman, og gjørt er av, at tá veiðan kemur upp á ta tilráðing, sum er galdandi fyri gulllaks, gevast skipini at fiska.

Tummas Christophersen, reiðari og skipari, sigur, at semja er millum feløgini um hetta.

Hann sigur, at Vestmenningur og Fram, sum hann hevur við at gera, hava fiskað umleið 6.000 tons av gulllaksi higartil í ár, og hann heldur, at veiðan hjá hinum báðum pørunum, Polarhavi og Stjørnuni og Eysturbúgvanum og Vesturbúgvanum, liggur um nakað tað sama.

– Hetta merkir, at vit nú nærkast tilráðingini, og tí verða skipini ikki á gulllaksi leingi aftrat.

Reiðarin Tummas sigur, at feløgini hava verið á fundi við umboð fyri Havstovuna um hesi viðurskifti, og tað er í besta forstáilsi millum partarnar, at fiskiskapurin heldur uppat, tá tilmælta veiðan er fiskað.

– Hetta er ikki nakað, ið er álagt okkum, sum veiða gulllaks, men hetta er ein avgerð, sum vit hava tikið í felag. Vit halda, at hetta er ein røtt avgerð, tí vit vilja gjarna gera okkara til, at henda vinna, bæði á sjógvi og landi, hevur eina framtíð, leggur reiðarin, Tummas Christophersen, aftrat.



**FYLGJA TILRÁÐING**

*– Vit halda, at hetta er ein røtt avgerð, tí vit vilja gjarna gera okkara til, at henda vinna hevur eina framtíð, sigur Tummas Christophersen*

*Mynd: Karstin Vang*

*Tummas Christophersen, reiðari og skipari Mynd: Birgir W. Høgnesen*